RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Tíðaravmarkað farloyvisstarv sum sølufólk til handilin í Miðlon

Til handil okkara í Havn søkja vit eftir einum dugnaligum og arbeiðssomum sølufólki til eitt tíðaravmarkað starv frá **1. desember 2023 til og við 30. juni 2024**.

Handilin í Havn er ein týðandi partur av okkara virksemi og stendur fyri størsta partinum av søluni í Føroyum.

Tú skal m.a. ráðgeva viðskiftafólki okkara, samstundis sum tú skal verða ein partur av tí dagliga arbeiðinum í handlinum.

## Vit ynskja at tú

- Trívist í føstum mannagongdum
- Er strukturerað/ur
- Er tænastusinnað/ur og brennir fyri at seta kundan í hásæti
- Er fyrikomandi, vinsæl/ur og hevur eitt jaligt sinnalag
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og í einum toymi

## Vit kunnu bjóða tær

- At gerast partur av einum arbeiðsplássi í menning
- Ein gerandisdag við fjølbroyttum uppgávum
- Upplæring í vørum og skipanum okkara

## Arbeiðstíð- og stað

Tín arbeiðsstaður verður í handlinum í Miðlon í Havn.
Arbeiðstíðin er **30 tímar** um vikuna og má í høvuðsheitum væntast at vera í tí tíðarrúminum tá handilin er opin. Eisini er neyðugt, at tú ert tøk/ur at arbeiða meira upp undir høgtíðir og til størri tiltøk.

**Løn- og setanartreytir**

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

**Umsóknarfreist**

Skrivlig umsókn saman CV og øðrum viðkomandi skjølum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 20. november 2023** og skal sendast við telduposti til starv@rusan.fo.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Kasper Skovlund, handilsleiðara í Havn, á 290411 ella Áka Johannesen Dahl, sølu- og tænastuleiðara, á 290410.